TIL **ARBEIÐIS**




*46 ára gamli Osvald Schiller Johansson minnist, at hann nærum altíð hevur ynskt at vera sløkkiliðsmaður. – Fyrr var tað, tí tað var eitt spennandi starv, men nú er tað meira fyri at hjálpa fólki, sigur hann*

**MYNDIR:** ÁLVUR HARALDSEN

## FAKTA **OSVALD**

**Navn:** Osvald Schiller Johansson

**Arbeiðspláss:** Brandstøðin í Havn

**Starv:** Sløkkiliðsmaður

**Besta við starvinum:**
At tað er fjølbroytt. Alt frá at hjálpa gomlum fólkum, sum er dottin heima, til at fara út til stórar vanlukkur

**Ringasta við starvinum:**
At koma til vanlukkur við ungum fólkum

**Størsti dreymur við starvi:**
Tað dugi eg ikki at siga. Vit hava tað so gott

**Størsta frambrot:** Dugi eg ikki at siga

**Starvstíð:** 19 ár

**Lívsstarv:** Ja

**Starvsfólk:** 20 við mekanikarum og eini 20 partíðarbrandfólk

**Sett á stovn:** 1. oktobur 1933

**Staður:** Oyggjarvegur 34

**Stjóri:** Kartni Jacobsen

# RING TIL **BRANDSTØÐINA**

SÍÐAN 1991 HEVUR **OSVALD SCHILLER JOHANSSON** VERIÐ **SLØKKILIÐSMAÐUR** Í HAVN. Í HESI TÍÐINI, HAR EISINI STÓRAR VANLUKKUR, HEVUR BRANDMAÐURIN FUNNIÐ ÚTAV EINUM: – VEITST TÚ IKKI, HVAR TÚ SKALT RINGJA, RING SO TIL **BRANDSTØÐINA**, TÍ VIT KUNNU TAKA OKKUM AV TÍ MESTA, GREIÐIR HANN MILLUM ANNAÐ FRÁ UM SÍTT FJØLBROYTTA ARBEIÐI



**TIL ARBEIÐIS**
**Eirikur í Jákupsstovu**
eij@sosialurin.fo

Bipparin hjá Osvaldi Schiller Johansson er farin í gongd.

Hann veit ikki enn hvørji boðini eru, men hann er greiðir yvir, at tað er eitt álvarsmál.

Tað er óljóð har brandmaðurin er, og tí hoyrir hann ikki, hvat bipparin sigur. Hinvegin er hann veit hann, at hann skal vera uppi á støðini um fimm minuttir.

Osvald nærum loypur út í bilin, setir í gongd og spælir boðini av bipparanum aftur.

So koma boðini: Tað er ein ferðsluvanlukka, har trý fólk sita føst í einum bili, sum er farin út av vegnum í Kaldbaksbotni. Tey eru lutfalsliga væl fyri.

Tað lætnar fyri sløkkiliðsmanninum.

– Eg taki altíð svørtu málingaspannina fram, tá boð koma yvir bipparan, greiðir Osvald Schiller Johansson frá.

Á støðini fara menninir í myrkabláu og gulu draktirnar.

Reyðu bilarnir fara blunkandi avstað við bláu ljósunum og larmandi sirenum.

Stutt eftir koma sløkkiliðsfólkini á staðið. Fólkini verða klipt úr bilinum við stóru tonginí og verða bjargað.

## 60 reyð uppkall

Líknandi støður – sum omanfyri nevnda – koma fyri umleið 60 ferðir árliga. Tá ringir reyða telefonin og sløkkiliðsfólkini, sum ikki longu eru á støðini verða í skundi boðsend.

Men soleiðis er ikki í dag.

Í dag er ongin svørt málingaspann.

Vit sita nevniliga inni í kaffistovuni á brandstøðini í Havn, og menninir sita róligir og eta nýbakaðu av skonsunum, sum brandmenninir sjálvir hava bakað.

Millum menninar er Osvald Schiller Johansson. Hann skal beint nú út við MBF bilinum, tí fólk av Virkni í Berjabrekku skulu oman í SMS.

Vit fara spakuliga út í reyða minibussin.

– Vit gera so øgiliga nógv ymiskt. Eg havi enntá tikið ein kettling úr einum instrumentbrettið á einum bili einaferð, sigur brandmaðurin og peikar á kilometurvísaran í rúmliga bilinum, meðan vit koyra oman eftir Oyggjarvegnum.

– Eg plagi eisini at siga tað. Veitst tú ikki hvar tú skalt ringja, ring so til brandstøðina, tí vit kunnu taka okkum av tí mesta, flennir sløkkiliðsmaðurin.

## Blíva kyniskir

Men lívið sum brandmaður er ikki bara at bjarga kettlingum, koyra fólk við breki og at hjálpa gomlum fólki á føtur. Tað eru eisini hendingar, sum upp á seg eru nógv meiri álvarsligar, og tá verða sløkkiliðsfólkini bjóðað av.

– Vit koma eisini út til vanlukkur, og tá vit eru farnir í gongd er ein ávís kynisma. Vit loysa bara uppgávuna, og eg minnist eisini eina ferðsluvanlukku, har eg fann kjøtpettir, sum ongin annar hevði sæð. Tá segði eg tað bara við portørararnar og so tóku teir eisini tey pettini við, greiðir sløkkiliðsmaðurin í 19 ár frá.

## Flenna tað burtur

Men tað eru ávísar uppgávur, sum hóast alt nerva sløkkiliðsmannin. Tað er serliga, tá yngri fólk eru við.

– Tað ljóðar eitt sindur løgið, men eru tað fólk, sum eru yngri enn eg, sum eru úti fyri vanlukku, so er tað nógv verri, fortelur Osvald.

Hann leggur afturat, at ávísar hendingar við smáum børnum hava havt við sær, at sløkkiliðsmenninir hava fingið sálarliga fyrstuhjálp.

– Men hinvegin haldi eg, at vit brandmenn duga rættiliga at flenna hendingar burtur, sigur sløkkiliðsmaðurin álvarsligum brá, beint áðrenn hann fer út úr bilinum at hjálpa fólkunum í koyristóli inn í bilin.

– Nú hopi eg, at onkur av tykkum keypir mær bomm, tí annars komi eg ikki aftur eftir tykkum, staðfestir Osvald flennandi.

– Ja, ja. Kanska fært tú, suffar ein av monnunum á Virkni, áðrenn tey fara út úr bilinum.